Rótfestir trupulleikar verða ikki loystir við at saga greinarnar av !

ónaðir arging ótti happing einsemi

Átak Happingarfríur skúli

SKÚLIN
Á GILJANESI
www.sag.fo

Happingarfríur skúli

Øll, sum vara av skúlanum, eiga í felag at virka fyri einum happingarfríum skúla.
Tað er ein mannarættur at fáa frið og at sleppa at vera tann tú ert.
Tað er eisini ein mannarættur at vera partur av einum størri felagsskapi, bæði fyri at menna teg sjálvan og eisini felagsskapin.

Tey, sum vara av okkara skúla

- LEIÐSLA
- LÆRARAR
- FORELDUR
- NÆMINGAR
- AÐRIR NÆMINGAR
- FLOKSLÆRARI
- SÁLARFRØÐINGUR
- SKÚLASTÝRI
- HEILSUSYSTIR

Rótfestir trupulleikar verða ikki loystir við at saga greinarnar av !

Hvussu fyribyrgja vit happing?

Foreldur og lærarar hava ein týðandi leiklut til tess at fyribyrgja

happing. Tey hava ábyrgd av at tosa við børnini um gongdina í skúlanum og trivnaðin hjá hvørjum einstøkum barni sær.

Samskifti og álit eru lívsneyðug, skal hetta eydnast. Tað er umráðandi, at allir avvarðandi partar virka saman, tí einstaka barninum og harvið øllum, skúlanum – og sjálvum samfelagnum – at frama.

Foreldur
Álit samskifti
Næmingar
Lærarar

Mannagongd

Á okkara skúla hava vit eina mannagongd, tá trupulleikar viðvíkjandi happing skulu loysast.

1. Flokslærarin fær fyrst fráboðanina.
2. Flokslærarin tosar við allar næmingar í flokkinum einsæris. Skúlans leiðsla verður kunnað um málið.
3. Flokslærarin roynir at loysa málið saman við flokkinum.
4. Flokslærari, saman við skúlans leiðslu, setir seg í samband við foreldur
5. Skúlans leiðsla fer, saman við avvarandi myndileikum, víðari við málinum.

Á okkara skúla

Góðtaka vit ikki:

Happing

Ljótan atburð

Harðligan atburð

Herverk

Vanvirðing

At líkasæla ræður

Vánaliga uppmøting

Á okkara skúla

Vilja vit hava:

Hampiligan málburð

Góðan og jaligan atburð

Sátt og semju

At vit fara væl um skúlan

góða uppmøting

at næmingur sýnir ábyrgd fyri trivnaðinum hjá hvør øðrum

at fólk sleppa at vera ymisk

at øll á okkara skúla hava frælsi at vera tann, tey eru

Rótfestir trupulleikar verða ikki loystir við at saga greinarnar av !

míni eygu glítra
mínar hendur dansa
mínir føtur líva
mínir fingrar flyta

míni orð tiga
mítt andlít lekur

míni tár hómast
mín sorg er duld
mín angist er loynd
mítt hjarta er sorað

eg hugsi um
at selppa burtur

ikki til nakað
ávíst stað

men vurtur tí
at eitt hvørt stað
saman hvar
má vera betri
enn her

tó veit eg
at sólin skínur

eisini fyri mær
eisini í mær

og hon skínur